# Starvsmannafelagið nýggjan sáttmála

**Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið skrivaðu sunnukvøldið undir nýggjan sáttmála, ið er galdandi til 1. oktober 2003.**

SÁTTMÁLA-VIÐURSKIFTI
*Dagfinn Olsen*

Einki verkfall hesaferð! Starvsmannafelagið er av størstu fakfeløgum í landinum og setir seg vanliga fyrst við borðið, tá samráðingar á arbeiðsmarknaðinum standa fyri framman. So hevur eisini verið hesaferð. Verkfallið fyri tveimum árum síðani stendur óivað enn í minninum á teimum flestu, men hesaferð slepst undan verkfallið, tí semja er fingin í lag.

Partarnir hava undirskrivað semju, dagfest 8. apríl 2001. Sáttmálin er galdandi til 1. oktober 2003, tað merkir, at hann er galdandi í 2 ár og 7 mánaðir.



### Einfaldari

Í nýggju semjuni verður m.a. sagt, at sáttmálin fevnir um nýggja og einfaldari lønarskipan, sum tryggjar eina rættvísa løn, har samsvar er millum starvsinnihald, ábyrgd og hvar starvsfólkið er í bygnaðinum – uttan mun til á hvørjum stovni tey eru sett. Nýggja lønarskipanin tryggjar somuleiðis javnstøðu millum kynini, tá ið lønin verður ásett. Lønarskipanin gevur ávísar lønarbetringar.

Talan er um lønarhækking uppá 7,5% í sáttmálaskeiðnum, stendur í semjuni millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið.

Eftirlønargjaldið verður hækkað 2,5% í sáttmálaskeiðnum, so hon samanlagt verður 8%.

Avtala er um framhaldandi at gera sáttmálan greiðari.

### Tiltøk

Víðari stendur í nýggju semjuni, at avtala er um tiltøk at styrkja førleikamenning, eldrapolitikk, familjupolitikk og javnstøðu. Her er dentur lagdur á ein aktivan starvsfólkapolitikk, ið skapar grundarlag fyri góðum trivnaðar- og menningar møguleikum hjá almennum starvsfólki, og sum leggur dent á sambandið millum arbeiðslív og onnur lívsviðurskifti.

Semja er eisini um avtalu um rættindir í sambandi við møguligar umleggingar í almennum virksemi.

Her er ásett, at um virksemi hjá landinum verður yvirtikið av øðrum at reka, eiga tær avtalur rættindir og skyldur, ið landið hevur mótvegis starvsfólkunum, óskerdar at verða lagdar á tann, sum yvirtekur virksemið.

Partarnir enda semjuna við hesum orðum:

Partarnir fegnast um, at tað hevur eydnast at funnið eina nøktandi semju, ið eigur at skapa trygg og greið sáttmálaviðurskifiti og sum samtundis leggur dent á búskaparligan stabilitet.

Gunnleivur Dalsgarð, formaður Starvsmannafelagsins, Karsten Hansen, landsstýrismaður og Thomas Magnussen, deildarstjóri, hava tann 8. apríl skrivað undir semjuna.


Hotel Hafnia um
PÁSKIRNAR

Skírisdag, langafríggjadag, leygardag, Páskadag og 2. páskadag:

**Kamar og morgunmatur**

Einkultkamar kr. ......400,-
Dupultkamar kr. ......300,- fyri hvønn
(Børn ókeypis)

RESTAURANT HAFNIA
er opin á páskum
men afturlatin
skírisdag og langafríggjadag, !

Sjá serlýsing fyri leygardag, Páskadag og 2. Páskadag !

Gleðiligar páskir !

HOTEL HAFNIA

Hotellið í miðbýnum

Tel 31 32 33 • Fax 31 52 50
E-mail: hafnia@hafnia.fo

www.tam.fo


# Rímuligt úrslit

**Formaðurin í Starvsmannafelagnum metir nýggja sáttmalan millum felagið og Fíggjarmálastýrið, sum eitt rímuligt úrslit. Endaliga hækkanin er 12,5%, umframt at sáttmálin er nýskapandi á mongum økjum**

SÁTTMÁLA-VIÐURSKIFTI
*Dagfinn Olsen*

Í tíðindaskrivi siga Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið eftir samráðingarnar, at samráðingarnar hava gingið væl og dentur hevur verið lagdur á djúptøknar broytingar, varðandi betringar og langtíðarloysnir í sáttmálaviðurskiftunum.

Lønarhækkingin er 7,5 % og eftirlønin hækkar 2,5%. Men samlaða hækkingin verður tó mett og sett til 12,5%. Síðstu prosentini verða mett og roknað eftir teimum flytingum og umleggingum, ið nýggi sáttmálin hevur við sær og hvat hetta kostar.

– Hetta verður ein meting. Tað verður mett, tí vónleyst er at rokna hetta út í smálutir, sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum.

### Nýskapandi

Nýggj lønarskipan er fingin í lag, men umframt sær nýggja semjan heldur øðrvísi út, enn, vanligt er. Fleiri nýggjar orðingar og avtalur merkja semjuna. Hóast ikki heilt ítøkiligar, so fegnast formaðurin um positivu gongdina.

Avtalur eru um førleikamenning, familjupolitikk og javndtøðu og um rætindi í samband við umleggingar í almennum virksemi.

– Hetta er nýtt. Hóast hetta ikki er so ítøkiligt, so er tað tekin um,. at tað ber til, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

Orðingarnar merkja, at partarnir nú fara til verka og hittast regluliga. Nevnd er sett at samstarva um hesi viðurskiftini og vónirnar eru góðar.

Serliga glaður er formaðurin í Starvsmannafelagnum um síðsta punkt í semjuni. Her verður staðfest, at verður alment verksmi yvirtikið av øðrum at reka, eiga avtalur og skyldur, ið landið hevur mótvegis starvsfólkum, óskerdar at halda fram og verða lagdar á tann, ið yvirtekur virksemið.

### Vilji frá báðum pørtum

Partarnir hava samráðst í langa tíð, men tað er ikki tí, at trupulleikar hava verið.

– Viljin hevur verið til staðar hjá báðum pørtum. Vit hava arbeitt nógv viðurskifti ígjøgnum og tá vit at enda komu til pengaspurningin, so hava báðir partar flutt seg, sigur Gunnleivur Dalsgarð, sum ikki dylir, at felagið hevði sett nøsina upp eftir størri hækking, men at felagið eisini hevur flutt seg og samanumtikið hevur fingið eitt úrslit, ið livast kann við.

– Eg eri samdur við Karsten Hansen, ið hevur úttalað seg í Útvarpinum, at vilji hevur verið vístur frá báðum pørtum, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

–Alt í alt hava vit fingið eitt rímuligt úrslit, sigur formaðurin í Starvsmannafelagnum.

Tað eydnaðist ikki at fáa viðmerking úr Fíggjarmálastýrinum. Heldur ikki frá Føroya Arbeiðarafelag, ið er eitt av stóru fel-øgunum, ið stendur næst í samráðingarrøðini, nú Starvsmannafelagið hevur lagt kósina, eydnaðist at fáa viðmerking. Har fara umbyggingar fram, eins og tey har eru rakt av landsumfatandi krímsjúkuni.



ítróttur

Nr. 70 • týsdagur • 10. apríl 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

**8 síður um VÍF**

# Ivamál um niðurflyting

**Sóljan er niðast á stigatalvuni fyri bestu kvinnudeildina, men HSF sigur, at Tjaldur skal flyta niður. Hetta hava tey Tjaldrinum ongan hug at góðtaka, og líkt er til, at hetta verður eitt mál, har nógvar fløkjur skulu greiðast, áðrenn ein endalig loysn verður funnin**

NIÐURFLYTING
*Jákup Mørk*



*Eftir at tey fýra ferð hava hitst á hondbóltsvøllinum, tykist tað nú vera á skrivaraborðinum at avgerð skal takast um, hvørt tað verða Sóljan ella Tjaldur, sum skulu flyta niður í aðru deild*

Aloftast verður sagt, at sannleikin stendur skrivaður á stigatalvuni, tá eitt kappingarár er lokið, men soleiðis tykist kortini ikki at vera í ár. Ivamál er nevnliga um, hvørt stigatalvan fyri bestu kvinnudeildina í hondbólti sýnir veruligu støðuna.

Har stendur annars, at Tjaldur og Sóljan eru ájøvn í stigum, men tá Tjaldur hevur ein munandi betri málmun, skuldi alt verið leyst og liðugt fyri teirra viðkomandi. Soleiðis er støðan tó ikki, tí ein skrivaraborðsavgerð hjá HSF tykist nú hava við sær, at Tjaldur í løtuni er at meta sum niðurflytari.

### Møttu ikki í Vági

Støðan er íkomin, tí Tjaldur ikki møtti til útidystin móti VB í grundspælinum, og sambært reglunum hjá Hondbóltssambandinum hevur hetta við sær, at tær nú noyðast úr deildini.

Jógvan Martin Mørk, kappingarstjóri hjá HSF, sigur í stuttari viðmerking, at avgerðin er tikin í tráð við reglunar hjá HSF.

– Har er ásett, at tá lið standa jøvn í stigum, er tað málmunurin, sum er avgerandi. Tó stendur í grein 7.7 í kappingarreglunum, at um so er, at lið verður dømt at tapa dyst, vegna væntandi uppmøting ella við eitt nú nýtslu av ólógligum leikara, skal liðið beina leið úr deildini.

– Støðan er tann, at Tjaldur ikki møtti til dystin í Vági, og tí eiga tær at víkja fyri Sóljuni á stigatalvuni, sigur Jógvan Martin.

Sostatt skuldi ein hildið, at alt var leyst og liðugt, men so er tó ikki – Langt ífrá.

### Ongan tíð fingið boðini

Í Runavíkini eru tey nevnliga als ikki nøgd við avgerðina hjá HSF í málinum.

Eitt er, at tey í Runavíkini hava nýtt einar 300tkr. at knýta leikarar at felagnum, og at talan ætlandi verður um eina líknandi upphædd fyri komandi kappingarár. Felagið hevur gjørt sáttmálar við venjaran, Zoran Sarcevic umframt tær tríggjar útlendsku spælararnar, Jelena Jevtic, Melitza Ergic og Vesna Tomajek, og tí er tað einki minni enn ein katastrofa fyri felagið, um tær komandi árið skulu spæla í næst bestu deildini.

Nakað annað er so tað, at runavíkingar als ikki siga seg kunna góðtaka handfaringina hjá HSF í málinum.

Rúni Joensen, sum er við í bólkinum, sum tekur sær av hondbóltinum á eystara armi á Skálafirðinum, sigur við Sosialin, at størsti trupulleikin er, at tey ongan tíð hava fingið at vita frá HSF, at tær kundu flyta niður á hendan hátt.

– Tann dysturin, sum alt snýr seg um, var tá vit í grundspælinum skuldu til Vágs at spæla. Veðrið var so avgjørt ikki nakað serligt, og tí ringdu vit til formannin í HSF, Petur Ova Petersen, og spurdu hann, um tað var gjørligt at sleppa undan ferðini. Hann svaraði okkum nakað soleiðis: »Vit hava ongan dómara fingið at døma dystin, so tað ger einki, um tit ikki fara suður. Eg helt, at tit longu vóru farin, men tíbetur er tað ikki so«

–Seinni um dagin ringdu tey frá VB, og spurdu, hví vit ikki vóru har suðuri, tá dysturin skuldi spælast. Tá vit førdu fram, at eingin dómari kortini var tøkur, fingu vit at vita, at tey høvdu skaffa dómarar av Tvøroyri til dystin, men hetta kundu vit tó als ikki góðtaka. Í øllum førum ikki, tá vit ikki á nakran hátt vórðu eftirspurd í málinum.

– Nakað eftir hetta stóð brádliga at lesa í bløðunum, at vit vóru dømd at tapa dystin, og tað halda vit vera ógvuliga løgið. Ikki minst, tá vit als ikki høvdu fingið boð um, at vit taptu dystin, um vit ikki fóru suður. Høvdu vit vita av tí, vóru vit sjálvsagt farin avstað, sigur Rúni.

Víðari sigur hann, at tey at byrja við ikki gjørdu so nógv við hetta. Tey høvdu so avgjørt ikki roknað við, at ein støða sum hendan fór at taka seg upp, men at tey sjálvandi reagera, nú støðan er vorðin, sum hon er.

### Innanhýsis trupulleiki hjá HSF

Um so er, at tey í Tjaldri hava grein í sínum máli, so tykist hetta mest av øllum at vera ein innanhýsis trupulleiki hjá HSF.

Í Tjaldri siga tey seg nevnliga hava verið í góðari trúgv, tá formaðurin í HSF segði við tey, at tey ikki noyddust at fara til Suðuroyar.

–Vit gingu út frá, at hetta var nóg mikið, men nú verður sagt, at vit skuldu havt boðað formanninum í kappingarnevndini frá hesum, men tað fingu vit so ikki at vita tá, sigur Rúni.

– Vit hava ongan tíð fingið nøkur skrivlig boð frá sambandinum um, at vit hava tapt dystin uttan at spæla, og eisini hetta halda vit vera ov galið. Eisini her sær út til, at HSF ikki hevur gjørt sína skyldu.

### VB fingið bóltin

Í eini roynd at greiða málið, hevur HSF so boðað Tjaldrinum frá, at um VB einki hevði ímóti tí, so kundu tær spæla dystin í hesi vikuni, men hesum hevur VB noktað, sigur Rúni.

– Eftir stigatalvuni at døma, er eingin ivi um, hvat lið er niðast. Vit eru 43 mál framman fyri Sóljuna, so har er eingin ivi. Nú skal tað knappliga verða VB, sum skal gera av, hvat lið skal niður í aðru deild, og tað líkist ongum. Hatta er eitt mál, sum HSF má avgreiða.

Rúni Joensen sigur at enda, at tað neyvan er sannlíkt, at ein endi fæst á hesum málinum í bræði. Hann vísir á, at tey so avgjørt ikki at ætla sær at sleppa málinum uttan víðari. Um neyðugt verður tað koyrt allan vegin til dómsnevndina, eru boðini frá Tjaldrinum.

Hinvegin er lítið at ivast í, at um HSF gevur Tjaldrinum viðhald, so hevur sambandið fingið ein nýggjan trupulleika at dragast við.

Tá er lítið at ivast í, at ónøgd verður at síggja frá Sóljuni, so alt í alt er als ikki sannlíkt, at málið er liðugt enn á sinni.